# Jens Martin er farin til hús

**HB málverjin, Bárður Johannesen, fer í dag fyri fyrstu ferð at verja føroyska landsliðsmálið**

MÁLVERJIN
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin*

Av persónligum ávum fór Jens Martin Knudsen sunnudagin úr føroysku landsliðsleguni í Spania. Harvið er greitt, at Føroyar ímóti Luksemborg í dag fer at hava nýggjan mann ímillum stólparnar. HB málverjin Bárður Johannesen sat á beinkinum leygarkvøldið, og í dag verður hann í málinum. Á beinkinum fer Gunnar Nielsen, sum eisini er HBari, at sita. Gunnar, sum umboðar Frem í Keypmannahavn, kom sunnudagin til Cadiz í Spania.

Bárður Johannesen er ikki nakar ársungi í fótbólti. Hann er 30 ára gamalur, og hann hevur verið fastur maður í HB málinum seinastu fimm árini. Bárður er annar HB málverjin á landsliðnum, síðani Føroyar í 1988 fingu altjóða limaskap. Tann fyrsti var Kaj Leo Johannesen, sum vardi føroyska málið fýra ferðir og ofta var eykamaður hjá Jens Martini Knudsen. Frammanundan altjóða limaskapinum átti HB fleiri landsliðsmálverjar: Marius Mikkelsen, Petur Sigurð Rasmussen, Regin Árting, Petur Petersen, Kári Thorsteinsson og Mikkjal Mikkelsen.

Bárður verður sætti málverjin á landsliðnum síðani 1988. Umframt Kaj Leo Johannesen, Jens Martin Knudsen og so Jákup Mikkelsen, sum orsaka av skaða gav avboð til venjingarleguna í Spania, hava hinir verið Bjarni Johansen og Sunvard Joensen.

**Pól neyvan tøkur**

Pól Thorsteinsson hevur ikki verið serliga heppin á landsliðnum. Leikbann kostaði honum alt 1999 og eisini dystir í 2000. Hann er við á ferðini í Spania, men tá ið venjingarlegan var tríggjar dagar gomul, legðist hann við influensu. Tá ið vit frættu í gjár, var hann framvegis sjúkur, og tað var rættuliga ivasamt, um hann fór at verða førur fyri at spæla í dag.

Atli Danielsen hevur havt smávegis trupulleikar við lærkrikanum. Tað varð mett í gjár, at hann og Jóhannis Joensen og Símun Samuelsen, sum tykist vera væl fyri, fara at fáa spælitíð í dag. Hóast Pól ikki var tøkur, so var Hans Fróði Hansen leygarkvøldið heilt uttanfyri liðið. Hann verður ivaleyst í dag ímillum teir, sum fara at fáa møguleikan.

# Saknurin av lyklaspælarum var katastrofalur

**Póland skoraði trý mál í tveir minuttir, og so avhølvaðu teir føroyska liðið, sum tóktist vera verri fyri, enn tað áður hevur verið hesa tíðina, og sum leið vanlukkuliga nógv undir, at tveir lyklaspælarar í verjuni ikki vóru tøkir**

PÓLAND–FØROYAR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin*

Leygarkvøldið løgdu føroysku landsliðsspælararnir rygg til eyðmýkjandi tap. Talan var um størsta landsliðstapið, síðani Jugoslavia 6. juni í 2001 vann 6–0 í Føroyum. Póland, sum fyri tveimum árum síðani akkurát kneykaðu 2–1 sigur ímóti Føroyum, skoraði seks mál, og føroyingarnir vóru sørir.

– Vit mugu bara staðfesta, at hetta á ongan hátt gekk, sum vit høvdu vónað, og vit høvdu heldur ikki roknað við, at tað skuldi vera so stórur munur. Spælbýtið kundi bent á polskan trý ella fýra mála sigur. Men teir høvdu stóra úrtøku, og dugdu væl at fáa nyttu burturúr mistøkum, og tá ið teir í tveir minuttir stutt fyri hálvleik skoraðu trý mál, var tað bara ein spurningur um, hvussu stórur sigurin skuldi gerast.

Tað er Jógvan Martin Olsen, hjálparvenjarin hjá Henrik Larsen, sum vit hava í telefonini. Hann staðfestir, at fyrstu fjøruti minuttirnar var munurin ikki so ógvuliga stórur.

– Vit vóru hampuliga væl við, hóast teir høvdu yvirvág. Okkara høvdu royndir ímóti málinum hjá teimum, og einki bendi á, at talan skuldi verða um stórt tap. Men so var heilt galið:

– Eg haldi, at í ov nógvum førum vóru okkara spælarar ikki so væl fyri, sum teir hava verið aðrar ferðir, tá ið vit hava verið á venjingarlegum hesa ársins tíðina. Tá ið konditiónin ikki er nóg góð, sæst tað aftur í ferðini, bóltførleikanum, yvirblikkinum og fatanini av spælinum, og tað hevur alt við sær, at mistøkini vera nógv og at tey raka meint. Um støðan framvegis fer at vera soleiðis, so er tað ein spurningur, um vit kunnu spæla landsdystir ímóti Pólandi og øðrum tjóðum, sum eru á teirra støði, staðfestir Jógvan Martin Olsen, sum veit, hvat hann tosar um. Hann hevur verið hjálparvenjari hjá landsliðnum síðani í 1996.

**Pól og Jón Rói dyggiliga saknaðir**

Føroyar hava síðstu árini havt væl skipaðan verjupart, sum hevur verið tryggi botnurin í liðnum. Hesa ferð var neyðugt at umskipa verjuna. Jón Rói Jacobsen, sum hevur verið álit, venur í Danmark fyri at koma fyri seg eftir at hava slitið krossbandið, og Pól Thorsteinsson hevur ligið við influensu mesta partin av tíðini, síðani føroyska ferðalagið kom niður á iberisku hálvoynna.

– Jón Rói og Pól eru bólttryggir og skjótir, samstundis sum teir duga væl at lesa spælið. Leygardagurin vísti, at vit eru meint raktir, tá ið teir ikki eru við. Men so skal eg leggja afturat, at Johan B. Hansen, sum fekk møguleikan á høgra vongverja, vísti seg at vera tann av okkara, sum var best fyri, og Óli Johannesen spældi sum um hann ikki ætlar sær at spæla av við landsliðssessin. Men tað ber trupulleikar við sær, tá ið fleiri útskiftingar verða gjørdar í verjuni, sigur Jógvan Martin Olsen.

**Kiksarar**

Tá ið pólverjar settu hol á í 9. minutti, var tað eftir føroysk kiks. Jens Martin Knudsen skuldi skjóta burtur eftir afturlegging, men bólturin fór eftir jørðini út til Pawe Kryszaowicz úr Amica Wronki. Hann sendi bóltin í tóma málið, og harvið hevði hann lagt grundarlagið undir størsta avrikið, sum hann nakrantíð hevur staðið fyri á pólverska landsliðnum. 29 ára gamli álopsspælarin skoraði tey trý korterini, sum hann var á vøllinum, fýra mál.

Eftir evarska lítlari løtu undan steðginum skoraði hann trý mál. Tað fyrsta fekk hann, eftir at føroyska liðið hevði mist á veg í álop, og verjan varð spæld heilt tunn. Í næsta førinum trillaði hann bóltin í tóma málið, eftir at ein av føroysku spælarunum hevði prikað bóltin framvið Jens Martini, og tað triðja stútaði hann mitt fyri málinum eftir hornasparksinnlegg.

Í 2. hálvleiki skiftu báðir partar nógv út, og spurningurin var bara, hvussu stórur pólverski sigurin skuldi gerast. Tveir av verjukendu spælarunum komu á málskjúttaralistan. Tá ið teir skoraði til 5–0, tóktist tað sum um, at teir gjørdu fríspark ímóti føroysku verjuni, men tað helt spanski dómarin ikki. Tríggjar minuttir undan leikloki staðfestu teir tennissigurin eftir sera hugflogsríkt uppspæl, har teir eftir tríggjar ferðir at spæla eitt tvey gjørdust púra blankir.

# Jens Martin í 60ara felagnum

**Í Spania hevur Óli Johannesen rudduliga staðfest, at hann framvegis ætlar sær at vera millum teir sjálvskrivaðu**

SPÆLARAHAGTØL
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Jens Martin er bara næsti føroyski leikarin, sum hevur rokkið teimum 60 landsdystunum*

Ofta hevur á hesum síðum verið tikið til felagið, ið bara teir eru limir í, sum hava rokkið 50 landsdystum. Felagið er framvegis eksklusivt, tí tað telur ikki fleiri enn seks limir. Tað er heldur eingin møguleiki fyri, at fleiri fara at gerast limir í hesum felagnum í ár. Næstu møguleikarnir eru Jákup Mikkelsen, sum hevur spælt 32 landsdystir, og Jákup á Borg og Pól Thorsteinsson, sum 31 ferðir hava verið á landsliðnum.

Nú er nýtt felag við at gerast veruleiki. Leygarkvøldið vardi Jens Martin Knudsen, sum verður 37 11. juni, føroyska málið fyri 60. ferð. Bara ein annar føroyskur spælari hevur verið so ofta á landsliðnum. Tað er liðformaðurin, Óli Johannesen, sum ímóti Póllandi spældi landsdyst nummar 64. Óli verður 32 6. mai.

Hesir báðir eru úrmælingar. Leygarkvøldið fór Jens Martin undir sítt seytjanda ár á landsliðnum. Hann var við í fyrsta FIFA landsdystum í 1988, og tað er einki, sum bendir á, at hann ætlar at leggja kongin.

Óli Johannesen, sum fyrstu ferð var á landsliðnum ímóti Ísrael á Svangaskarði í august í 1992, hevur boðað frá, at hann fer at spæla við TB í 2. deild, og at einki fer at broyta hansara trúfesti ímóti barndómsfelagnum. Í fjør fekk Óli at vita frá venjarunum, at hetta fór ikki at økja hansara møguleikar at halda tørn um landsliðssessin.

Í Spania hevur Óli víst, at venjararnir kunnu rokna við honum:

– Óli spældi væl leygarkvøldið, og í venjingunum hevur tað verið hugaligt at síggja, at Óli er væl fyri, og at hann er alla tíðina er millum teir fremstu og tekur uppgávuna sum liðformaður í stórum álvara, sigur Jógvan Martin Olsen.

Leygarkvøldið var Óli Hansen úr NSÍ fyri fyrstu ferð á landsliðnum. Hann er 87. spælarin, sum hevur umboðað Føroyar, í teimum 92 altjóða skrásettu landsdystunum síðani altjóða limaskapin í 1988.

**Fróði upp á 25**

Leygarkvøldið var Fróði Benjaminsen fyri 25. ferð á landsliðnum. Hetta var samstundis fyrsta ferðin, at hann umboðaði annað felag enn barndómsfelagið á Toftum. Spæliloyvið hjá Fróða er nú hjá Fram í Reykjavík. Fróði er 23. føroyski spælarin, sum hevur spælt 25 landsdystir. Næstur at røkka hesum talinum verður ivaleyst Rógvi Jacobsen. Hann er skrásettur fyri 24 landsdystir. Hann var úttikin til Spaniu ferðina, men hann gav avboð.

Aðrir spælarar høvdu eisini smærri rundar dagar á landsliðnum leygarkvøldið. Christian Høgni Jacobsen spældi landsdyst nummar 20, og Hjalgrím Elttør var fyri tíggjund ferðina á landsliðnum.

Julian Johnsson spældi landsdyst nummar 55. Harvið legði hann Allan Mørkøre afturum seg. Allan var tann fyrri teirra, sum rakk 54 landsdystum.



# Havnin fær einki gjørt



*Dráttur sýndi leygardagin, at skal nakar nerta nakað av oddaliðunum, so mugu tað helst verða tær*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað er ikki bara hjá monnunum, at flogbólturin í høvuðsstaðarøkinum ikki hevur tað nakað serligt.

Tað fyrr so einaráðandi kvinnuliðið hjá Fleyr hevur seinnu árini havt tað sera tungt, og heldur ikki um vikuskiftið bragdaði hjá teimum.

Hesaferð var ÍF á vitjan, og tær fóru heim aftur við einum 3-0 sigri í viðførinum. Sigurin var tó ikki altíð líka vísur, og tey bæði fyrstu settini stríddust tær á heimaliðnum sera væl. Báðu ferðirnar endaði alt tó við sigri til verandi meistararnar, og so fall alt saman hjá Fleyr, sum enn er einsamalt í botninum av talvuni.

Kollafjørður er eisini partur av høvuðsstaðarøkinum, og í flogbóltshøpi merkir tað, at eisini tær eru partur av botnstríðnum. Her er tað tó helst ikki sama kenslan, sum ger seg galdandi, tí sum nýggjasta liðið í deildini ræður fyrst og fremst um at staðfesta sína støðu í deildini hjá teimum. Tað gjørdu teir eisini so dyggiliga tey fyrstu umførini, men eftir at kanadiski stórspælarin óvæntað varð noydd at fara heim aftur, hevur mest sum staðið í stað hjá teimum.

Hesa ferð tók KÍF ímóti Drátti, sum helst er einasta liðið, sum kann órógva gullveitsluna hjá Mjølni, og tað var eisini sjónligur munur á liðunum. Dráttur tók sær ein tryggan 3-0 sigur, har KÍF ongan tíð var í nær námind nøkrum setti, og við hesum tykist Dráttur halda lyftið, sum tær góvu eftir taptu steypafinaluna. Tá søgdu tær seg framhaldandi vilja stríðast í hvørjum einasta dysti, og so er spurningurin, um tað er nóg mikið til at hjálpa tvørakvinnunum.

# Fram tók eitt sett

**Bæði ÍF og SÍ vunnu væntaðu sigrarnar um vikuskiftið, men Fram megnaði tó at taka sett ímóti tapandi steypafinalistunum**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Eina lítla løtu megnaði Fram at kløkka SÍ, men nóg mikið til stig var tað á ongan hátt*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað var ikki stórvegis av spenningi undan teimum báðum mansdystunum um vikuskiftið.

Kappingin er langt síðani blivin til eina kapprenning millum Mjølnir og ÍF, og fyrst og fremst eru tað dystirnir millum hesi bæði liðini, sum spenningurin hevur verið um. Tó kann eisini roknast við, at sørvingar fara at royna at pilka við hetta, og møguliga verður tað so, at tað verða teir, sum gera av, hvar meistaraheitið fer.

Hesaferð var tó eingin innanhýsis uppgerð millum hesi lið á skránni. Mjølnir hevði frí, meðan ÍF og SÍ dystaðust móti illa sperdu havnarliðunum, og her gjørdust úrslitini ikki óvæntað, at stigini fóru úr høvuðsstaðnum.

Leygardagin megnaði Fram tó eina lítla løtu at loypa hvøkk á sørvingar, tá teir fóru avstað við triðja settinum í einum dysti, sum SÍ fram til tá hevði fult tamarhald á. Tað var nokk eisini bara so, at gestirnir tóku tað dekan ov róligt hesa løtuna, og tá teir so aftur settu ferð á í fjórða settinum, var einki roks.

Tað var tað heldur ikki, tá ÍF vitjaði Fleyr. Her gjørdist úrslitið ein tryggur 3-0 sigur til ÍF, sum sostatt togaði seg upp á oddasessin í deildini. Her eru teir í løtuni eitt sett betri enn Mjølnir, men hinvegin eiga klaksvíkingarnir ein dyst til góðar, so enn eru tað teir, sum hava fyrimunin.

## Flogbóltsúrslit

**Meistaradeild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| KÍF-Dráttur | 0-3 | (11-25, 16-25, 16-25) |
| Fleyr-ÍF | 0-3 | (25-27, 21-25, 16-25) |
| Mjølnir-TB | 3-2 | (25-23, 25-27, 25-20, 13,25, 18-16) |

**Meistaradeild menn**

| | | |
|---|---|---|
| Fram-SÍ | 1-3 | (12-25, 17-25, 25-15, 15-25) |
| Fleyr-ÍF | 0-3 | (15-25, 17-25, 15-25) |

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mjølnir | 16 | 13 - 3 | 42 | 16 | 26 | 18 |
| 2 | TB | 16 | 12 - 4 | 41 | 15 | 26 | 16 |
| 3 | Dráttur | 16 | 9 - 7 | 34 | 26 | 8 | 14 |
| 4 | ÍF | 16 | 7 - 9 | 25 | 30 | -5 | 10 |
| 5 | KÍF | 16 | 6 - 10 | 22 | 39 | -17 | 7 |
| 6 | Fleyr | 16 | 1 - 15 | 9 | 47 | -38 | 1 |

**Meistaradeild, menn**

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 13 | 11 - 2 | 35 | 9 | 26 | 15 |
| 2 | Mjølnir | 12 | 11 - 1 | 33 | 8 | 25 | 15 |
| 3 | SÍ | 13 | 7 - 6 | 26 | 21 | 5 | 10 |
| 4 | Fram | 13 | 2 - 11 | 10 | 34 | -24 | 2 |
| 5 | Fleyr | 13 | 1 - 12 | 5 | 37 | -32 | 2 |

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 6 | 5 - 0 - 1 | 481 | 364 | 117 | 21 |
| 2 | VB | 6 | 6 - 0 - 0 | 499 | 376 | 123 | 20 |
| 3 | VÍF | 6 | 4 - 0 - 2 | 465 | 377 | 88 | 17 |
| 4 | Neistin | 6 | 3 - 0 - 3 | 452 | 416 | 36 | 14 |
| 5 | StÍF | 6 | 1 - 0 - 5 | 412 | 486 | -74 | 7 |
| 6 | Søljan | 6 | 1 - 0 - 5 | 342 | 453 | -111 | 4 |
| 7 | Kyndil | 6 | 1 - 0 - 5 | 302 | 481 | -179 | 3 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kyndil | 4 | 3 - 0 - 1 | 423 | 388 | 35 | 15 |
| 2 | Neistin | 4 | 3 - 0 - 1 | 400 | 367 | 33 | 12 |
| 3 | StÍF | 4 | 2 - 0 - 2 | 356 | 334 | 22 | 11 |
| 4 | VÍF | 4 | 2 - 0 - 2 | 369 | 348 | 21 | 10 |
| 5 | KÍF | 4 | 1 - 0 - 3 | 364 | 417 | -53 | 5 |
| 6 | H71 | 4 | 1 - 0 - 3 | 341 | 399 | -58 | 4 |

## Máltindarnir

**Kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Simona Dziugyte | Neistin | 153 | (25) |
| Aukse Vysniaskaite | VB | 135 | (37) |
| Nicoleta Radu | Søljan | 121 | (23) |
| Ioana Rápa | VÍF | 113 | (26) |
| Daiva Tuomaite | VB | 112 | (16) |
| Katarina Stepanov | Stjørnan | 100 | (20) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 98 | (20) |
| Gurið Mortensen | VB | 93 | (6) |
| Milica Ergic | StÍF | 92 | (10) |
| Irina Rodevici | VÍF | 85 | |
| Nikolina Eyðbjørnsdóttir | VÍF | 82 | |
| Joan M. Djordjevic | Stjørnan | 80 | (28) |
| Annika Ljósstein | Stjørnan | 79 | (19) |
| Heidi Maria Akselsen | Søljan | 75 | (5) |
| Lina Andriulyte | Neistin | 73 | |

**Menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Halgir D. Olesen | H71 | 97 | (9) |
| Blagoje Buha | Neistin | 93 | (22) |
| Dragisa Stojovic | Neistin | 92 | (3) |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 87 | (33) |
| Damir Oros | KÍF | 76 | (24) |
| Áki Mørk | Neistin | 74 | (15) |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 73 | |
| Ingi Olsen | VÍF | 69 | (23) |
| Agnar Joensen | VÍF | 67 | (8) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 63 | |
| Høgni Klein | Kyndil | 63 | (2) |
| Gert Hansen | KÍF | 62 | (2) |
| Sámal Joensen | VÍF | 57 | (8) |
| Artur Johansen | StÍF | 57 | (11) |
| Alexandur Johansen | StÍF | 56 | (21) |